VIÐMERKINGAR

# Tí má A hava sessin!

**Hanna Jensen**
*Fólkaflokkurin*



**Hugsjónin**
Rákið í Føroyum er, at fólk sum heild og politiskir flokkar ynskja størri sjálvræði fyri Føroyar. Einasti munur er á, hvussu langt vit tora at hugsa, og hvussu vit trúgva tað kann gerast veruleiki, hóast summi halda, at tey eru einastu, sum umboða hesa hugsjón. Og tá so er, má arbeiðast miðvíst fyri, at fullveldi fæst fyri Føroyar.

**Fólkaræði**
Ein sannroynd er, at vit eru glað fyri fólkaræðið, og eisini í sjálvstýris/fullveldismálinum má tað virðast. Meirilutin av føroyingum má koma til ta niðurstøðu, sum fleiri longu eru komin til, at okkara ríkisrættarliga støða er ein blindgøta, tá um politik, sjálvbjargni, íbirting og menning á vinnuliga økinum ræður.

**Samráðing**
Tí er samráðing og diplomati vegurin fram. Onkur kallar tað kallsbergsku loysnina. Í Folkaflokkinum hava vit eina sannføring um, at samráðingarvegurin er tann best gongdi. Væl mugu vit læra at gerast betri og betri diplomatar, so vit ikki verða tikin á bóli. Snildi og klárskygni eru eisini neyðug og harafturat støðufesti..

**Loysnir**
Fólkaflokkurin hevur eina ætlan, sum kann bera á mál. At reisa mál á Fólkatingi er ikki nokk! Loysnir á teimum ymisku málunum má vera kravið. Og nú stórmál sum Danmark/ES-málið eru fyri durunum, er neyðugt við einum klókum eygleiðara, sum hevur nógvar royndir, og sum dugir væl at samráðast á Fólkatingi. Stutt sagt: vit hava brúk fyri einum veruligum diplomati á Fólkatingi!

Tí má A hava minst annan sessin!

# Sambandsflokkurin - skapar trygd við samstarvi

**Atli Hansen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin*



Kjølfestur í teimum bestu virðum í okkara fólki liggur Sambandsflokkurin til akkers í tryggari legu. Hann tekur ikki tey stóru sveiggini, men stendur fyri tí hóliga og skilagóða og borgar fyri dygd í teimum politisku framstigunum.

Soleiðis eisini í arbeiðinum innan ríkisfelagsskapin - á fólkatingi. Umboðini fyri Sambandsflokkin hugsa um føroysk áhugamál og samstarva við aðrar flokkar í fólkatinginum um at røkka góð úrslit.

Føroysku loysingarumboðini hava forkomið nógvum og lagt gift fyri nógvum møguleikum - ikki bara í teirra virki innan fólkatingsgáttina, men kanska serliga í tí fatalu loysingarsamgonguni á Føroya løgtingi, so tað er meira umráðandi enn nakrantíð, at Sambandsflokkurin varðveitir fólkatingssessin sum verja móti hesum ágangi.

Tí er tað eisini meira neyðugt enn nakrantíð, at øll sambandsáhugaði - og gjarna nógv onnur - fara á val og seta krossin við Sambandsflokkin. Hann stendur fyri tí trygga og røktini av ríkisfelagsskapinum.

Einki kemur av sær sjálvum. Vit mugu berjast fyri tí, sum vit hava kært.

Gott val.

# Limaskap í Norðurlandaráðnum

**Jacob Vestergaard**
*Fólkaflokkurin*



Fólkaflokkurin vil ávirka danir at viðmæla føroyskum sjálvstøðugum limaskapi norðurlandaráðnum.

# Svar til Marjus Dam

**Sjúrður Skaale**



Marjus Dam gevur í Dimmalætting í gjár fólki ta fatan, at tann faldari, eg havi sent í hvørt hús, er rindaður við almennum donskum pengum, sum eru markaðir til arbeiðið á fólkatingi.

Um hetta hevði verið rætt, hevði tað verið beinleiðis ólógligt, og eg hevði kunnað verði revsaður fyri tað.

Eg kann ikki góðtaka, at Marjus alment leggur meg undir slíkt lógarbrot. Har gongur markið — hóast tað er valstríð.

Faldaran, sum er farin í hvørt hús, havi eg sjálvur rindað fyri úr egnum lumma. Bæði uppseting, myndir, prent og útbering.

# Fult sjálvræði á fleiri økjum

**Ingi Olsen**



Vit mugu fáa føroyskan limaskap í altjóða IWC-hvalaveiðufelagsskapin um, soleiðis at vit sjálvi kunnu tala okkara søk.

**XA Valevni Fólkafloksins**

# Avbjóðingar

**Heðin Zachariasen**



Vit vilja virka fyri, at okkara ungdómur við síni vitan og førleika verða ein náttúrligur partur, sum eisini verður umboðaður úti í heimi.

**XA Valevni Fólkafloksins**

# Fram móti sjálvstøðugum Føroyum

**Hanna Jensen**
*Fólkaflokkurin*



Besti grundvøllur fyri føroyingar uttan mun til aldur, kyn og samfelgsbólk er einar frælsar sjálvstøðugar Føroyar.

**XA Valevni Fólkafloksins**

# Veljið ávirkan og úrslitini

**Bjarni Djurholm**
*Fólkaflokkurin*



Fólkaflokkurin er hin sami. Er, har tað er brúk fyri honum. Altíð fúsur, samdur - og tí sterkur og virðiligur. Vit velja Føroyar, ikki Bruxelles ella Norðatlantsbólkin.

**XA Valevni Fólkafloksins**